# Morð í løgnari samkomu skelkar Svøríki

**Sviar øtast við av tíðindunum um harðskap og ólevnað í einari lítlari samkomu í Knutby - ein leiðandi trúboðari er fongslaður illtonktur fyri millum annað morðið á konu sína.**

MORÐ Í KNUTBY
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

10. januar klokkan 04:47. Ein 30 ára gamal maður verður funnin skotløstaður í Knutby, nærhendis Uppsala. Løtu seinni verður tann 23 ára gamla Alexandra Fossmo funnin myrd; tann myrda er kona ein leiðandi lokalan trúboðara.

Dagin eftir verður ein 26 ára gomul barnagenta hjá trúboðaranum fongslað aftan á at hava viðgingið fyri politinum at hon átti lut í illgerðunum. Barnagentan skal annars hava verið djúpt forelskað í trúboðaranum men varð víst úr samkomuni aftan á at hon í november hevði mishandlað ta nú myrdu Alexandru Fossmo við einum hamara. Hon er varðhaldsfongslað mistonkt fyri morð, morðroynd og grovan harðskap og játtar seg seka; tað verður tó hildið at hon kann hava verið stýrd av øðrum.

Samstundis fær løgreglan illgruna um at fyrra kona trúboðarans kann hava verið myrd, heldur enn at hava latið lív av einum óhappi í 1999. Kanningar í málinum um ta fyrru konu trúboðarans verða tiknar uppaftur av nýggjum og politiið festir seg nú við at tann 27 ára gamla Heléne Fossmo kann hava verið deyð av eitran, og ikki av at vera dottin og hava sligið seg í, sum annars hevur verið hildið.

Trúboðarin og elskarindan hjá honum verða handtikin, bæði undir mistanka fyri at hava planlagt morðið á Alexandru Fossmo umframt at hava staðið aftan fyri ta miseydnaðu morðroyndina á mannin hjá elskarinduni, tann 30 ára gamla ið varð løstaður.

Tann 38 ára gamla systirin hjá tí myrdu Alexandra Fossmo verður av mongum mett sum veruligi leiðarin av samkomuni í Knutby. Hon skal alment hava latið seg víga sum »Brúður Kristusar« og skal fyrr hava havt eitt ógvuliga tætt samband við tann morðmistonkta trúboðaran. Tann karismatiski norski trúboðarin, sum saman við »Brúður Kristusar« hevur stýrt Knutby samkomuni, noktar seg sekan eins og elskarindan men situr eins og hon framvegis fongslaður, og tað sama ger barnagentan ið hevur viðgingið.

## Jørðisk motiv

Løgreglan illteinkir trúboðaran fyri at hava viljað fullført sítt ætlaða morð á tann særda 30 ára gamla í sjúkrabilinum á veg til Akademiska Sjukhuset í Uppsala. Hetta var sambært eina keldu innan løgregluna orsøkin til at trúboðarin fylgdi við í ambulansuni.

– Tað er møguligt at hann royndi at finna eitt høvi at fáa tann 30 ára gamla skotskadda at tiga fyri altíð, segði ein løgreglu kelda sambært Uppsala Nya Tidning.

Síðani skotdramaið hevur politiið havt illgruna um at trúboðarin ætlaði at drepa tann 30 ára gamla, og lívvaktir eru settar inn.

Morðnáttina var tann 30 ára gamli vaknaður av at tað bankaði á kamarshurðina; konan hjá honum svav hjá »Brúður Kristusar« men hevur annars í longri tíð livað meir ella minni fast saman við trúboðaranum.

– Í fyrstani helt eg at tað mundi vera í spølni, greiddi tann 30 ára gamli frá á sjúkrahúsinum nakað aftan á morðroyndina.




*Nakrar fáar í rúgvuni av blaðgreinum um sorgarleikin í Knutby.*
*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*

– Ein lítil persónur sum helt vápninum í báðum hondum, ljóðaði signalementið og passaði til ta fyrr morðmistonktu 26 ára gomlu barnagentuna.

– Tað var eitt øgiligt buldur, tað ringdi í oyrunum.

Eitt par vaknaði sum búði til leigu í heiminum hjá tí 30 ára gamla. Tey lupu við sínum tvey ára gamla soni í fanginum til at hjálpa sínum verti. Tá tann 30 ára gamli var komin á sjúkrahús, við trúboðaranum undir liðini, varð kona trúboðarans, Alexandra Fossmo, samstundis funnin deyð. Trúboðarin varð beinan vegin tikin til avhoyringar.

Løgreglan arbeiðir út frá at motivið til tað ætlaða dupultmorðið var at trúboðarin og hansara elskarinda vildu av við sínar hjúnafelagar. Tann 30 ára gamli og Alexandra Fossmo vóru eisini arbeiðsfelagar. Tann 30 ára gamli rak eina web fyritøku saman við einum øðrum limi í Knutby samkomuni og átti, saman við sínum verfaðiri, eisini eitt eigarafelag; hetta verður mett sum møguligur partur av motivinum, nevniliga at varðveita hesar ognar í familjuni. Hevði tann 30 ára gamli skilt seg frá konu sínari, elskarindu trúboðarans, so høvdu hesi ognarligu viðurskifti sæð øðrvísi út.

Tann 30 ára gamli møtti konu sínari í Uppsala. Tey fluttu inn hjá hennara foreldrum og gjørdust soleiðis grannar hjá trúboðaranum. Tá ið hjúnalagið ikki vísti seg at vera tað ið hon hevði vónað vendi hon sær til trúboðaran, og tey bæði blivu elskarar.

## Stórur ampi

Hendingarnar kring samkomuna í Knutby hava skakað Svøríki og sett eitt heitt orðaskifti í gongd. Dagbløð og loftmiðlar hava í fleiri vikur verið á gosi við tíðindum og viðmerkingum har borðreitt hevur verið við einum ótali av ódámligum detaljum um viðurskiftir og umstøður í sambandi við Knutby samkomuna.

Tað stutta av tí langa er at øll tey innblandaðu í morðdramanum hava livað ógvuliga nær hvør at øðrum í tí innasta sirklinum í Knutby samkomuni. Tá ið til dømis Filadelfia-kórið framførdi í Knutby Folkets Park tann 27. juli ár 2000 sungu fleiri av høvuðspersónunum við: tann 26 ára gamla barnagentan sum nú hevur viðgingið morð, tann 30 ára gamli skotskaddi og kona hansara, og kvinnan ið kallar seg »Brúður Kristusar«.

– Vit halda tað vera ólógligt at siga seg vera »Brúður Kristusar« tá man ikki er tað, skrivaði ein hvassorðað Malin Ullgren í Kvällsposten týsdagin.

– Tað átti at verið revsivert, longu áðrenn deyðan, at reka samkomu virksemi tá man ikki er førur fyri at skilja ímillum sakligt og myndatalu.

Hvítusunnurørslan var annars skjót at taka avstand tá tíðindini um morðið fréttust og boðaði alment frá at samkoman í Knutby á ongan hátt er partur av Hvítusunnurørsluni, hóast samkoman skal hava sagt seg tilhoyra Hvítusunnurørlsuna og skal eisini hava sagt seg vera inspirerað av Livets Ord.

Samtakið hjá Hvítusunnurørsluni hevði boðið sær til at hjálpa við ráðgeving og at seta ein nýggjan trúboðara í Knutby men varð avvíst. Samstundis varð heitt á limirnar í Knutby samkomuni um at fara hvør til sítt og lata samkomuna upploysast, hetta tó uttan úrslit.

Óróin hevur teir seinastu dagarnar verið stór millum trúarligar leiðarar og onnur ið alsamt meira sóu Knutby samkomuna sum eina dómadags sekt, ein kult við kollektivum sjálvmorði í kvittanum. Aftan á sunnudagsins prædiku um dómadag og verðins enda góvu bæði Svenska Kirkjan, Hvítusunnurørslan og Livets Ord úttrykk fyri einum ítøkiligum ótta um at eitt annað Waco ella Jonestown kann vera í ferð at taka seg upp í Knutby. Vandin fyri einari katastrofu av tí slagnum varð sambært ein serfrøðing hjá Svensku Kirkjuni vaksandi í takt við at Knutby samkoman tóktist isolera seg meira og meira frá umheiminum. Tó helt ein annar serfrøðingur at hesin óttin var púra yvirdrivin og at Knutby samkoman als ikki ber eyðkenni av dómadags kulti.

## Reisir fordómar

Allir partar tykjast tó samdir um at fólkini í Knutby onkursvegna mugu fáa hjálp, hóast tey sjálv ikki halda seg hava hana fyri neyðini.

– Tað er ein samfelagsligur innsatsur sum nú má til, segði Karl-Erik Nylund, ein lokalur fyristøðumaður innan Svensku Kirkjuna, við TV4 Nyheterna.

– Her er tørvur á øllum góðum kreftum, legði hann afturat.

Nylund, ið verður roknaður sum serfrøðingur innan sektir, var ein av teimum sum slógu alarm aftan á prædikuna í Knutby sunnudagin. Hann vísti á at samkoman kendi seg trongda av øllum umheiminum samstundis sum hon vrakaði tilboðið frá Hvítusunnurørsluni um hjálp og ístaðin talaði um verðins enda.

– Tá gerist eg í øllum førum óróligur, segði Nylund.

– Allar ávaringar lampur lýsa nú. Situatiónin kann leiða til eina katastrofu. Eg hugsi um kollektivt sjálvmorð. Vit hava sæð líknandi situatiónir bæði í Waco og Guyana. Tá vóru samkomurnar undir hørðum trýsti og valdu at steingja hurðina fyri umheiminum.

Men ein annar serfrøðingur, Peter Åkerbäck, sum fyri Dagens Nyheter gjørdi eina kanning av samkomuni í Knutby, helt ikki at nøkur serliga sannførandi tekin bendu á eitt komandi kollektivt sjálvmorð.

– Knutby vísir eingi tekin um dómadags sekt, segði Åkerbäck. Hann vísti á at tað finnast nógvar samkomur innan Hvítusunnurørsluna ið ofta tala um dómadag uttan at hetta yvirhøvur inniber nakran vanda í so máta.

– Samkoman livir í Knutby. Tey práta við tíðindafólk. Tey hava opnar fundir. Pressa, útvarp og sjónvarp eru sloppin at taka lut á fundunum hjá samkomuni. Tað bendir als ikki á stongdheit.

Åkerbäck meinar at tað finnist ein greiður tendensur til at tá okkurt extremt hendir í einum lítlum átrúnaðarligum bólki, má rørslan sum so beinan vegin leggja sjógv millum seg og bólkin. Tað hendi eisini aftan á morðdramaið í Knutby, tá fleiri leiðandi trúboðarar innan Hvítusunnurørsluna vóru skjótir út at distansera seg frá Knutby samkomuni samstundis sum teir settu spurning við teirra máta at tulka Bíbliuna og prædika.

– Aftan á sorgarleikin í Waco í Texas, sum var ein útbrótarabólkur frá sjeyndadags adventistunum, máttu sjálvt sjeyndadags adventistar í Svøríki út í miðlarnar fyri at markera at »vit eru øðrvísi«.

Uttan mun til hvussu er og ikki, so hevur sorgarleikurin í Knutby longu fingið avleiðingar fyri Hvítusunnurørsluna og nógv foreldur taka nú síni børn úr barnabólkum í samkomunum.

– Hetta smittar á okkum men uppmerksemið í miðlunum ger at flestu skilja at Knutby er ikki nøkur vanlig Hvítusunnu samkoma, segði ein trúboðari hjá Filadelfia í Stockholm, Sten Gunnar Hedin, við Aftonbladet.

Hedin, sum eisini er talsmaður fyri Hvítusunnurørsluna í Svøríki, staðfesti at Knutby sorgarleikurin reisir bæði spurningar og fordómar.

– Eingin onnur samkoma í Svøríki líkist tí í Knutby. Men tað finnast tendensir til ein autoriteran leiðslustíl eisini í øðrum samkomum, tað órógvar meg.




NORÐURLANDAHÚSIÐ **TILTØK FEBRUAR 2004**

**SKRÁIN VIKA 6 - 7**

**Fríggjadagur 6. februar**
**Kl. 20.00** **Føroyskur barnadansur (FO)** — Fyriskiparar Dansifelagið í Havn (FO) og Norðurlandahúsið í Føroyum. Hetta er seinasta ferð veturin 2003/2004

**Sunnudagur 8. februar**
**Kl. 16.00** **Filmssýning (FO) Eykasýning** — Dokumentarfilmurin "Spegil í minni mínum" (FO) hjá Ingun Olsen í Skrivarastovu (26 min) (FO). Filmurin er partur av høvuðsuppgávu á Goldsmiths College í London og ein stuttfilmur hjá Siggu Vang (FO) í samband við filmsvísund (15 min)

**Mikudagur 11. februar**
**Kl. 20.00** **KLIPP** — Filmsfelag Norðurlandahúsins (FO) sýnir filmin "ANTANARJUAT the fast runner". Leikstjórnað hevur Zakarias Kunuk, Kanada (167 min)

**Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-17.00 og sunnudagar kl. 14.00-17.00**

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo**






Flogið verður til Valencia 3. og 17. juli 2004. Gist verður í tvær vikur á tí stóra ferðamannastaðnum Marina D'or***, sum liggur við Miðalhavsstrondina. Vel ímillum kamar til 3 fólk ella íbúð til 6 fólk.



Prísdømi:
4 fólk í íbúð v/aircondition, 2 kømur, bað, køkur v/vaskimaskinu
**Vaksin 8.400,-**
**Børn u. 12 ár 6.900,-**



Prísdømi:
4 fólk í íbúð v/ ½pensión og drykkivørum, aircondition, 1-2 kømur, køkur, stova, bað
**Vaksin 10.550,-**
**Børn u. 12 ár 7.650,-**

*Sí prísir á* ***www.flogfelag.fo***

team85

ATLANTIC AIRWAYS
FLOGFELAG FØROYA

Áarvegur 6 · Tel 34 00 00 · annika@ff.fo · www.ff.fo